| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. oktober 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2011 tann 27. oktober kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 21. oktober 2011 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Gordon M. Petersen
Jann Toftegaard
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni
Elisabeth D. E. Olsen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Dánjal Vang, sum hevði forfall. Gudny Vang og Magnus Midjord hava pr. telefon í dag boðað borgarstjóranum frá, at tey ikki kunnu møta til fundin, vegnað forfall.

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen

- **Mál viðv. eykajáttan til havnaútbygging til 2. viðgerðar.**

**Havnabygging 2011/2012**

Í samband við ætlaða havnabygging millum frystikei og oljukei á havnalagnum í Fuglafirði hevur lisitatión verið upp á arbeiðið tann 21. september 2011 og komu 3 tilboð inn nevniliga frá niðanfyri standandi feløgum:

1. P/F Articon kr. 4.775.289,00
2. P/F Heildarverk kr. 4.309.801,00
3. P/F J & K Petersen kr. 3.981.383,00

Sambært kostnaðarmeting frá teknisku deild kommununar, dagfest 21. september 2011, sum er gjørd eftir at tilboðini vórðu latin upp, verður mett, at endaligi kostnaðurin verður kr. 7.900.000,00, og tá verður roknað við, at tikið verður av lægsta tilboðnum frá P/F J & K Petersen.
Talan verður um eina bryggjulongd upp á 60 metrar á 13 metra dýpi, svarandi til kr. 132.000,00 fyri meturin.

Av teimum kr. 7.900.000,00 hevur býráðið á fundi tann 28. juni 2011 við 2. viðgerð samtykt at veita eina eykajáttan upp á kr. 3.000.000,00 til keypi av spurnsjarni fíggjað við meirinntøkum av mettum partafelagsskatti, og er henda avgerð sambært § 53, stk. 2.3. kunnað Fíggjarmálaráðnum tann 29. juni 2011.

Sambært fyriliggjandi hevur spurnsjarnið kosta kommununi kr. 2.600.000,00, so kr. 400.000,00 standa eftir til eina møguliga partvísa fígging av ætlaðu havnabyggingini.

Sostatt verður staðfest, at írestandi fíggingin av havnabyggingini, sum eftir ætlan kemur at verða framd í 2011 og 2012 kemur at verða tilsamans kr. 4.900.000,00. Í hesum sambandi metir tekniska deildin, at útreiðslurnar í 2011 verða mettar til kr. 2.200.00,00 og í 2012 til kr. 2.700.000,00.

Sambært hesum metingum verður neyðugt, um havnabyggingin skal gerast veruleiki, at býráðið játtar eina eykajáttan í 2011 upp á kr. 2.200.000,00 og haraftrat avsetir restina kr 2.700.000,00 á fíggjarætlanini fyri 2012 til íløgur í B. Íløgur í "Kommunal virki".

Vísandi til & 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, so verður mælt fíggjarnevndini/býráðnum til, at ein møgulig eykajáttan til omanfyri nevnda arbeiði í 2011 upp á kr. 2,2 mió. verður fíggjað av rakstrarstaði 20.52.11.530.01 "Partafelagsskattur" konto 618000.

Grundgevingin fyri nevndu fígging er, at sambært teimum staðfestingum, sum kommunan hevur fingið frá Taks um inntøkur av partafelagsskattinum fyri 2011, so kemur kommunukassin at fáa eina samlaða inntøku upp á kr. 8,3 mió. móti mettum kr. 3,0 mió á fíggjarætlan kommununar.

Við tað at býráðið tann 28. juni 2011 við 2. viðgerð hevur samtykt at veita eina eykajáttan upp á kr. 3,0 mió., eisini til havnagerð, so varð inntøkan av partafelagsskatti tessvegna við hesi avgerð hækkað upp í kr. 6,0 mió. Staðfest er, at samlaði partafelagsskatturin verður kr. 8,3 mió., og við eini eykajáttan upp á kr. 2,2 mió., so skuldu kr. 100.000,00 verið eftir á konto 618000.

Sambært hesum skuldu møguligar meirinntøkur hjá Fuglafjarðar havn og av A+B skatti komið øðrum íløgu- og rakstrarstøðum og/ella gjaldføri kommununar tilgóðar.
Sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini skal ein eykajáttan hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili og skal sambært § 53, stk. 2 3) í somu lóg verða kunnað

landsstýrismanninum í fíggjarmálum innan 3 dagar aftaná, at henda er samtykt við 2. viðgerð.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi í fíggjarnevndini tann 07. oktober 2011 og mælir ein meiriluti í nevndini Elisabeth D. Eldevig og Sigurð S. Simonsen býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini frá 05. oktober 2011 um fíggjarleist av arbeiðinum við møguligari havnabygging millum frysti- og oljubryggjuna, og at ein eykajáttan upp á kr. 2,2 mió. í 2011 verður veitt av meirinntøku av partafelagsskatti.

Magnus S. Midjord tekur endaliga støðu í málinum á býráðsfundi.

Somuleiðis varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 07. oktober 2011 um fíggingarleist av havnabyggingini og at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 27. oktober 2011, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Málið hevur verið til viðgerðar á fíggjarnevndarfundi tann 21.10.2011 og varð samtykt at taka undir við býráðssamtyktini tann 12. oktober 2011 um at beina málið til 2. viðgerð á býráðsfundi tann 27.10.2011til endaliga staðfesting.

Málið hevur verið til 2. viðgerð á býráðsfundi tann 27. oktober 2011.

**Avgerð á býráðsfundi 27 oktober 2011:**
Samtykt at veita eykajáttan til havnaútbygging í samsvar við tilmælið til býráðsfundin tann 12. oktober 2011. Sostatt varð fyriliggjandi uppskot til eykajáttan til havnaútbygging endaliga samtykt. (7-0).

**Mál viðv. Eykajáttan til keyp av bili til teknisku deild, samb skriv frá teknisku nevndini.**

Soljóðandi skriv dagf.18.10.2011er komið frá teknisku nevnd til fíggjarnevndina:

Ford Transit lastbilurin við krana hevur verið til sýn og krevur nógvar ábøtur, sum vit ikki meta loysir seg at gera, tá bilurin er gamal og gjøgnumgangandi niðurslitin, hann er frá 1999.
Mælt verður tí til, at nýggjur bilur verður keyptur ístaðin og fíggjaður við at flyta kr. 285.000,- frá rakstrarstaði 06.38.11..530.10,- vegir rakstu, konto 160001, til konto 325000 "Flutningsútbúnaður" á rakstrarstaðið 06.38.13.531.20 "rakstrargøgn íløga".

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 21. oktober 2011. Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 285.000 til keyp av nýggjum arbeiðsbili til teknisku deildina.
Fíggingin verður fingin til vega við yvirflyting frá rakstrarstaði 06.38.11.530.10 "Vegir rakstur" til rakstrarstað 06.38.13.531.20."Rakstrargøgn Íløga".

Tá talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum/fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 27. oktober 2011 og varð samtykt at taka undir við tilmælunum frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini, samstundis sum býráðið setur spurnartekin við hvørt ætlaða bilkeypið er tað rætta, og beina eykajáttanina upp á kr. 285.000 til keyp av bili til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundi tann 24. november 2011. Hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri.(7-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.30.

Sigurð S. Simonsen

Gordon M. Petersen

Jann Toftegaard

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sonni á Horni

Elisabeth D. E. Olsen

Skrivari:

Marin Sólheim Thomsen